# Oljan frá Schiehallion til Sullom Voe í Hetlandi

*Við avgerðini at lata oljuna frá stóru oljukelduni Schiehallion fara til oljuhavnina í Sullom Voe í Hetlandi - og avgerðini herfyri um at lata oljuna frá Foinaven til Flotta á Orknoyggjunum - hevur BP tryggjað báðum hesum oyggjabólkunum ein týðandi leiklut í menningini av tí nýggja oljulandslutinum á Atlantsmótinum.*




JAN MULLER

Stóra bretska oljufelagið, BP almannakunngjørdi í gjár, at olja frá stóru Schiehallionkelduni á Atlantsmótinum skal flytast til oljuhavnina í Sullom Voe í Hetlandi.

Hetta eru sera góð tíðindi fyri hetlendingar, sum herfyri kendu seg vera við skerdan lut, tá tað varð avgjørt, at oljan frá tí fyrsta feltinum, sum fer at framleiða olju vestan fyri Hetland, Foinaven, skal flytast til oljuhavnina Flotta á Orknoyggjunum.

Nú hevur BP, sum er operatørur fyri báðum feltunum, býtt javnt millum hesar báðar oljuhavnirnar, sum hava so ómetaliga stóran týdning fyri bæði oyggjasamfeløgini.

Schiehallion oljufeltið, sum eisini fevnir um minni grannakelduna Loyal, liggur stutt frá føroyska markinum. Ætlanin er at fara undir framleiðslu í 1998. Framleiðslan á grannafeltinum Foinaven skal byrja um stutta tíð.

**Hetlendingar fegnir**

Tað er greitt, at hetlendingar eru sera fegnir um avtaluna, tí hon tryggjar nógv arbeiðspláss og inntøkur til Hetlands. Íløgur skulu gerast uppá einar 100 mill kr. fyri at kunna taka ímóti oljuni frá Schiehallion.

Bretski orkumálaráðharrin, Lord Fraser of Carmyllie sigur í eini viðmerking, at henda avtalan er ein nýggjur varði í oljumenningini vestan fyri Hetland. Tað er politikkurin hjá bretsku stjórnini at skunda undir leitingina eftir olju og gass og somuleiðis framleiðsluna frá teimum nýggju keldunum millum Hetland og Hvíta økið millum Føroyar og Hetland.

Meðan framleiðsluskipið til Foinanaven kelduna er komið uppá pláss fáar fjórðingar frá føroyska markinum, verður eitt nógv størri framleiðsluskip bygt til Schiehallion. Tað verður bygt í Belfast.

Í hesum sambandi hevur BP kunngjørt, at ein nýtt slag av oljuflutningsskipi verður bygt til at flyta oljuna frá Schiehallion til Sullom Voe. Tað skal kunna lasta 125.000 og skal rekast av BP. Skipið verður liesað frá AP Møller fyri 14 ár. Tað er í løtuni í gerð á skipasmiðju í Korea.

Luttakandi oljufeløgini í Schiehallion-feltinum eru umframt BP við 33,35%, Shell við 33,35%, Amerada Hess við 15,69%, Statoil við 5,87%, OMV við 5,87 og Murphy Petroleum somuleiðis við 5,87%. Grannakelduna Loyal býta BP og Shell javnt millum sín.

Schiehallion-projektið er mett at kosta 9 milliardir krónur. Tá framleiðslan verður í hæddini verður hon 140.000 tunnur um dagin. Stóra framleiðslu- og goymsluskipið skal kunna goyma 950.000 tunnur av olju.

Tað er annars BP, sum stendur fyri oljuframleiðsluni á Sullom Voe vegna 29 feløg. Útbyggingin av terminalinum fer at gera 150 nýggj arbeiðspláss frá í summar.

*Vit síggja tær mongu olju- og gasskeldurnar, sum funnar eru vestan fyri Hetland. Oljan frá Foinaven verður flutt til Flotta á Orknoyggjunum, og oljan frá Schiehallion til Sullom Voe í Hetlandi. Harvið er javnt býtt og hava oyggjasamfeløgini tryggjað sær týðandi arbeiðspláss*

Ein kann siga, at við hesi nýggjastu avgerðini, er enn ein lunni lagdur undir ein nýggjan oljulandslund á Atlantsmótinum. Eingin ivi er um, at áhugin fyri økinum, fer at økjast, og tað er greitt, at nú BP, sum eisini hevur áhuga fyri at vera við í oljuleitingini við Føroyar, skal reka skipini, ið skulu bæði goyma og flyta oljuna, verða helst eisini møguleikar hjá føroyskum sjómonnum at fáa arbeiði har umborð. Tað fer tíðin so at vísa. Men eingin ivi er um, at tað hevði verið kærkomið fyri føroyingar, sum harvið eisini kundu verið við í arbeiðinum til havs at byggja upp eina oljuvinnu á øllum Atlantsmótinum.

## Samdir ella ei

Samdir ella ei,
hattin av fyri tí manni
sum eina meining hevur
og torir at standa við henni.

Hvussu ofta ikki
vit her sótu teir menn,
tá úr erva bleiv rópt
sum hundar, undan síni ábyrgd renna.

So, samdir ella ei,
kvøðu verdigur er Sverri hann,
sum uppgávu á seg tók
heilur og ikki hálvur fór fram.

Og áttu vit bara
sum Sverra fleiri slíkar í verð,
tá brátt aftur kennast vildi
framburður á Føroya klettum her.

Tí semjur fyri skuld,
er bara bara ikki nokk
um eitt fólk æruni vil bjarga,
tað søgur so mangar hava spátt.

**12.1.97.**
**Baraldur á Berhellu**

GÓLVTÆNASTAN

*Alt innan gólv...*
*Ókeypis tilboð verða givin.*
*Vit ferðast um alt landið*

**Skemmingsgøta 19 100 Tórshavn**
**Tlf. 18875 - 88875**
**Fax 18809**

*tíðindablaðið*
**SOSIALURIN**
**BOX 76 · 110 Tórshavn**

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið




*Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum – og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.*

- ☐ Haldarar í Føroyum: 235,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: 425,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Danmark: (5 bl. í senn): 340,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir

Til ber altíð at gerast haldari og goldið verður bert fyri bløðini, ið eftir eru av ársfjórðinginum

Navn: ....................

Bústaður: ....................

Postnr., bygd/býur: ....................

Tlf.: .......... Undirskrift: ..........